Kristina Háfoss
løgtingsmaður

Nr. 54/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um ætlanina at hækka samanlagda bundna eftirlønargjaldið til 21%, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rætt at rinda samanlagt 21% av lønini í bundnum eftirlønargjaldi og gjaldi til Samhaldsfasta frá løntakara og arbeiðsgevara?

2. Hví ætlar landsstýrismaðurin at hækka bundna eftirlønargjaldið til eginpensjón úr 12% upp í 15%?

3. Ætlar landsstýrismaðurin at lækka útgjaldið úr Samhaldsfasta og inngjaldið á tilsamans 6% frá arbeiðstakara og arbeiðsgevara til Samhaldsfasta?

4. Heldur landsstýrismaðurin, at hækking av bundna eftirlønargjaldinum økir ójavnan millum láglønt og hálønt á arbeiðsmarknaðinum, og tá tey gerast pensjonistar?

Viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur sent lógarbroyting til hoyringar. Talan er um týðandi broyting í løgtingslóg um eftirløn. Hetta er eisini ein broyting, ið er enn eitt átak, sum fer at undirgrava pensjónsnýskipanina, ið varð samtykt í undanfarna valskeiði – og enn eitt átak, ið økir ójavnan millum láglønt og hálønt.

Millum týðandi málini í pensjónsnýskipanini vóru:
- At tryggja øllum eina góða pensjón, at minka ójavnan og herímillum at tryggja, at pensjonistar uttan aðra inntøku skuldu fáa meira at liva av.
- At meira varð spart upp í felag, og tí varð kravið til inngjald til egna pensjón lækkað.
- At minni partur av pensjónini hjá fólki í Føroyum varð forskattaður, so fíggjarliga haldførið hjá vælferðarsamfelagnum varð styrkt nú og frameftir.

Tí varð lógarkravda inngjaldið til eginpensjón lækkað úr 15% av lønini niður í 12%. Hesin partur verður forskattaður og verða 0 kr. rindaðar í skatti til land og kommunur, tá fólk gerast pensjonistar. Eisini økir hesin parturin av eftirlønini ójavnan millum pensjonistar, tá teir røkka pensjónsaldri.

Samstundis varð inngjaldið til Samhaldsfasta hækkað úr 1,75% upp í 3% frá arbeiðstakara og úr 1,75% upp í 3% frá arbeiðsgevara. Samanlagt verður sostatt rindað 6% í Samhaldsfasta. Hesin partur verður skattaður við útgjald. Í staðin fáa arbeiðsgevarar frádrátt fyri inngjaldið og løntakarar hava botnfrádrátt í lands- og kommunuskatti. Henda broyting var tí eisini við til at styrkja fíggjarliga haldførið og møguleikan hjá landi og kommunum at veita vælferðartænastur – so sum eldrarøkt og heilsuverk – so hvørt vit gerast fleiri eldri.

Samanlagt eru føroyingar sostatt álagdir við lóg at rinda 18% av lønini til pensjónsuppsparing, t.e. eginpensjón og Samhaldsfasti. Hartil fáa øll fólkapensjón og rinda part av lønini umvegis landsskatt til hesa pensjón.

Hóast hetta kemur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum nú við lógarbroyting, ið skal áleggja løntakarum at rinda 3% afturat í eftirlønargjaldi. Harvið verður komið upp á heili 21% í lógarbundnum inngjaldi til eftirløn. Við hesi broyting verður meira tikið av lønini, meðan ein er á arbeiðsmarknaðinum, og fara fólk at fáa munandi lønarhækking, tá tey fara av arbeiðsmarknaðinum.

Fyri at fáa lýst málið, verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 14. februar 2020

Kristina Háfoss